VIÐMERKINGAR

# Hvat er ætlanin Bjarni Djurholm landstýrismaður?

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður



Júst afturkomin av uttanlandsferð í arbeiðsørindum frætti eg stórtíðindi. “Ongin framtíðar flogvøllur á Skorðhæddini”. Havi higartil livað í tí trúgv, at “konsensus” í flogvallamálinum var, at 3 alternativir møguleikar fyri framtíðar flogvølli skuldu kannast til botns nevnliga Skorðhæddin, Glyvursnes og Søltuvík. Úrslitini skuldu so kunngerast, og tað staðið sum var best egnað og hevði flestu fyrimunirnar sigraði.

Tíverri havi eg ikki hoyrt grundgevingarnar frá Bjarna Djurholm fyri at sleppa ætlanunum á Skorðhæddini endaliga. Siti við nøkrum spurningum, sum eg vóni at vinnumálaráðharrin svarar í bløðunum, tí seinasta freist at seta munnligar spurningar í Løgtinginum er farin.

1. Hvørjar nýggjar, víttfevndar og nágreinligar kanningar hevur Bjarni Djurholm sett í verk á og rundanum Skorðhæddina. Hvat vísa hesar og hvat hava tær kostað?

2. Sama spurning viðvíkjandi Glyvursnesi og Søltuvík ?

3. Hvat gjørdi, at flogvallamøguleikin í Suðureysturoy endaliga bleiv sleptur ?

4. Skorðhæddin liggur í Nes kommunu. Hvat samskifti hevur verið við Nes kommuna umframt hinar grannakommunurnar kring fjørðin í samband við kanningarnar, og eru tær kunnaðar um úrslitið?

5. Stendur samgongan aftan fyri niðurstøðuna hjá landsstýrismanninum?

Seinasta fráboðaða ætlanin frá landsmyndugleikunum fyri Suður Eysturoy, var ein brúgv tvørtur um innsiglingina til Skálafjørðin. Hetta hóast Nes, Runavíkar og Sjóvar kommuna í felag arbeiddu við eini tunnilsloysn, ið skuldi fremjast uttan kostnað fyri landið; ynski um brúgv er ikki komið frá fjarðbúgvum.

Um risa verkætlanin at sambinda Suðurstreym og Suðureysturoy við einum undirsjóvartunnli eydnast, verður nógv avlopstilfar, ið kundi verðið nýtt til ger av flogvølli. Loysnirnar mugu vit finna í felag, og staðbundnu myndugleikarnir eiga at takast við í størri mun, enn talan hevur verið um higartil.

# Tekniskir trupulleikar í samgonguni

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK
løgtingskvinna



Eg sá smílibondini hjá Tobba fyri mær, tá ið ein tíðindasending fyri og onnur eftir, alla stilluviku á tamb, tóku fyrispurningin upp, sum snúði seg um m.a. at flyta Tekniska skúla úr Havn til Klaksvíkar.

Tað vóru ikki bara fjølmiðlarnar, sum fóru uppfrá, men so sanniliga eisini fleiri av politikarum okkara, bæði úr løgtingi og landsstýrið. Enntá landsstýrismaðurin í Almanna og Heilsumálum valdi at seta tíð av til at svara fyrispurninginum, sum annars var settur til Jógvan á Lakjuni.

Nú veit eg ikki hvat í norðoyatingmenninir siga til alla hesa uppmerksomheit, sum fyrispurningurin hjá Tobba fær, men í mínari verð var hasin parturin av fyrispurninginum, sum snúði seg um at flyta Tekniska skúla í Havn til Klaksvíkar, eitt ekkó av tí, sum eg havi hoyrt óteljandi ferðir áður. Og eg haldi ikki, at eg fari skeiv, um eg haldi meg hava hoyrt norðoyatingmenninar sagt nakað tað sama um Tekniska skúla, sum Tobbi sigur. Men uttan at fjølmiðlarnir yvirhøvur hava varnast tað.

So onkursvegna megnar Tobbi at tosa við eini rødd, sum hoyrist.

Og her kemur undirritaða so eisini við inn á banan, sum annars ikki tók tann partin, sum snúði seg um at flyta tekniska skúla í Havn til Klaksvíkar í álvara. Av tí einføldu orsøk at eg veit, at Tekniski skúlin í Havn verður ikki fluttur. Eg tori at leggja høvdið á blokkin fyri, at ongin løgtingslimur, kemur at atkvøða ímóti tí uppskotinum, sum er í nevnd, og sum snýr seg um at játta pengar til at fíggja bygginh av einum nýggjum Tekniskum skúla í Havn.

Alt annað vildi eisini verið óðamannaverk. Havi sjálv arbeitt á Tekniska skúla í Havn í trý ár. Og hóast sera ótolandi hølisumstøður, so er ongin ivi um, at næmingar, lærlingar og handverkaravinnan ynskja at skúlin skal verða í Havn. Skúlin hevur ment sína mentan og umhvørvi her í høvuðsstaðnum, og tað er tí ikki nakað, sum tú kanst avritað niður í eitt annað øki.

Eitt er at rokna tøl út á einum excellarkið. Men hesi tøl siga onki um trivna, áhuga, ídni og mentan.

Nú fær Pól Michelsen í lesarabrævið í farnu viku tað at síggja út sum um, at Tjóðveldisflokkurin er fyri at leggja teknisku skúlarnar saman. Men tað er ikki rætt! At meir enn tann eini limirin hevur tosað fyri hesum ger tað ikki til floksins støðu. Eg hugsi eisini, at Pól Michelsen lættiliga kundi funnið fleiri tinglimir í Fólkaflokkinum, sum kundu sagt tað sama sum Torbjørn. Men fyri tað er tað neyvan Fólkafloksins støða.

Sjálvt landsstýrismaðurin í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni, umboðandi Fólkaflokkin segði í útvarpinum í stilluviku, at tað hevði verið skilagott, at lagt skúlarnar saman, men tann realpolitiska støðan var nú einaferð soleiðis, at tað bar neyvan til. Og tað var útfrá tí realpolitisku støðuni, at hann var noyddur at handla. Og tað var tí, at hann ikki legði skúlarnar saman, og ikki tí, at hann sum umboðandi Fólkaflokkin í landsstýrinum ikki helt, at tað var rætt.

Og tá ið Pól Michelsen heldur so hánt um tað, sum eg havi ført fram um fíggingina av Tekniska skúla, so skilji eg ikki hesar atfinningar. Eg kann bara minna hann á, hvat í hann sjálvur segði um fíggingina av Hovs tunnlinum. Tá var hann, sum tann einasti fólkaflokspolitikkarin, sum kravdi, at tunnilin skuldi fíggjast sum vanlig íløga, har í játtað varð tað á fíggjarlógini, sum tað kostaði tað árið. Soleiðis at virksemi sást aftur á fíggjarlógini. Men nú knappliga er PM farin í kórið hjá teimum sum siga, at hesin fíggingarháttur er ikki so tíðningarmikil kortini. Um Tekniski skúlin sum nú ætlandi skal byggjast hevði verið fíggjaður eftir vanligari mannagongd, har virksemi sást aftur á fíggjarlógini, so hevði tað merkt, at avsettar vóru einar 35 til 40 mió kr í fýra ár. Meðan samgongan velur eina loysn, har hon sigur 9 mió kr í 20 ár. Við tí avleiðing, at skúlin verður 30 mió kr dýrari samanlagt, og við tí avleiðing at virksemi í samfelagnum ikki sæst aftur á fíggjarlógini. Men eftir at skattalætti er givin uppá 240 milliónir krónur, avgjøld tikin av B&O anleggum, rakstrarstuðul innførdur aftur til vinnulívið, osfr alt meðan undirskotini á fíggjarlógini eru fleiri hundrað milliónir, so má man gera okkurt kreativt. Og hví ikki bara seta virksemi í gongd nú og senda rokningina út í framtíðina.

Eitt er fíggingarhátturin annað hvør skúli skal byggjast.

Tjóðveldisflokkurin hevur saman við Pól Michelsen hildið fast um at byggja ein miðnámsskúladepil við Marknagil ið kundi hýst øllum trimum miðnámsskúlunum í Havn. Men tann ætlanin er nú punkterað, við hjálp frá PM. Bara tí at ein av einogtjúgu er ímóti.

Men ikki nóg mikið við, at mann droppar miðnámsskúladepilin. Men tað, sum verri er, er, at mann onki projekt hevur sett í staðin. Landsstýrismaðurin hevur framvegis ikki gjørt av, hvør skúli skal byggjast. Hann biður bara um pengarnar, og so skal hann finna útav aftaná, at Løgtingi hevur játtað honum pengarnar einaferð í næstu viku, hvat hann skal brúka pengarnar til. Frá tingsins røðarapalli segði hann, at tað fór hann at finna útav aftaná, at tingið hevði játtað pengarnar!

Soleiðis hvílir tann breiða semjan á éinum herðum.

So samanumtikið verður uttan iva einmæld semja í tinginum fyri uppskotinum at játta fígging til bygging av Tekniska skúla í Havn. Við sitandi samgongu er onki alternativ fyri skúlanum

Hetta sær jú út til at verða einasti mátin, ið samgongan unnir handverkaravinnuni ein tekniskan skúla. Men at talan er um ábyrgdarleysa mannagongd bæði í fíggingini og í fyrireikingini, er harmiligt. Tí tað fyrireikandi arbeiði viðvíkjandi skúladeplinum var klárt, tá ið sitandi samgonga tók við, og fíggjarpolitikkurin frá 80-árunum var jarðlagdur. Men samgongan hevur megnað at punkterað tað fyrireikaða arbeiðið og kveistrar fíggjarstýring fyri borð.

# Klassastríð í Miðlahúsinum

**Hvat snýr klassastríðið seg um í okkara tíð? Tað fara Ingeborg Vinther og Jóannes Eidesgaard at umrøða á 1. mai tiltaki, sum Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skipar fyri í Miðlahúsinum í Vágsbotni mánadagin eftir 1. mai fundin á Vaglinum**



1. MAIDAGSHALD
*Tíðindaskriv frá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag*

Spurningurin um, hvat klassastríðið í dag er – hvat innihaldið er og hvussu klassastríðið vísir seg – hevur verið frammi hetta seinasta árið. Formansfrágreiðingin á Landsfundinum er tulkað soleiðis, at Javnaðarflokkurin hevur avsagt klassastríðið. Onnur hava tulkað útsagnir frá fakfelagsleiðarum so, at nú er mótparturin hjá teim tímaløntu ikki longur arbeiðsgevararnir, men mánaðarløntu løntakararnir.

Men hvat halda so tveir av høvuðsleikarunum um støðuna, tá svarini skulu hvessast og bara spurningurin um klassastríðið og høvuðsuppgávurnar hjá arbeiðararørsluni skal viðgerast? Hvørjar tulkingar eru tær røttu og hvørjar nuansir eru, verða vit vónandi klókari um eftir tiltakið.

Ætlandi fara tey at umrøða bæði heimligar og altjóða spurningar. Ikki minst spurningin um, hvussu klassastríðið hættar sær í heimshøpi, nú búskaparligu mørkini kámast og frælsi alt meira merkir ótálmaðir virkismøguleikar hjá kapitalinum.

Eisini hugni og tónleikur

Umframt Ingeborg og Jóannes verður eisini tónleikaframførsla. Troubadururin Sámal Ravnsfjall, sum jú er royndur 1. mai sangari, verður eisini við á tiltakinum, har hann fer at framføra nøkur av sínum góðu løgum.

Og annars kunnu fólk hugna sær við práti og skemti afturvið einum drekkamunni.

Tiltakið verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni, tá 1. mai fundurin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag er liðugur.

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag bjóðar øllum at verða vælkomin á 1. mai tiltakið.

# Carita forkvinna í Norrønafelagnum

Carita Björklund heldur fram sum forkvinna í Norrøna Felagnum í Føroyum, og Hallstein Sigurðsson heldur fram sum næstformaður. .



Á aðalfundinum í mars bar Heðin M. Klein seg undan afturvali. Hann var nevndarlimur í Norrøna Felagnum í Føroyum í 22 ár. Fyri hann varð Elin Michelsen vald í nevndina.

Hallstein Sigurðsson varð afturvaldur. Hini í nevndini eru Kári á Rógvi og Eyrith Leyni.

## Slættanes

Seinasta freist hjá limunum at tekna seg til útferðina hjá Norrøna Felagnum í Føroyum til Slættanes leygardagin 17.juni er 8. mai.

Farið verður við bussi úr Havn til Sørvágs, haðani siglt verður norðurum til Slættanes. Eftir steðgin á Slættanesi verður siglt á Oyrargjógv og so við bussi aftur til Havnar.